NÁM

# HEIMSMÁLINI Á FILMI

HEIMSMÁL
fyri burðardyggari menning

## FILMSKAPPING
*fyri hádeild og miðnám*

## VINNINGUR
**30.000 kr**

## Til næmingin

Við 30.000 krónum í vinningi skipar Nám aftur í ár fyri filmskapping fyri hádeild og miðnám um Heimsmálini hjá ST.
Hesaferð skulu luttakandi filmar lýsa burðardygga umsiting av lívinum í havinum (Ocean Literacy).

Longdin á lidna filminum skal í mesta lagi vera 7 minuttir. Frásøgumátin er upp til tykkara.
Tit kunnu gera filmin sum heimildarfilm, listafilm ella annað slag av filmi, sum tit gera av, bara hann heldur seg til evnið og endamálið. Tala í filminum skal vera á føroyskum, og tað kann vera ein fyrimunur at skriva undirtekst.
Allir næmingar í hádeild og miðnámi í landinum kunnu melda seg til kappingina hjá Námi.
Mælt verður til, at flokkurin arbeiðir saman. Hetta kann til dømis vera ein verkætlanaruppgáva, har filmurin er úrslitið.
Lærarin, sum hevur flokkin, skal góðkenna filmin.

Tosa ella spæla næmingar sjálvir í filminum, skal loyvi gevast frá foreldrum ella verja.
Lidni filmurin skal kunna brúkast til undirvísing, sum hann er. Filmurin skal hava innihaldsliga tyngd og vera tekniskt í lagi, samstundis sum hann skal hava eina fjøltáttaða tilgongd at lýsa valda evnið. Upptøkurnar skulu vera tykkara egnu og ikki læntar frá øðrum.

Ein dómsnevnd verður sett at meta um innkomnu filmarnar. Dómsnevndin tilskilar sær rætt at velja frítt millum innkomnu filmarnar. Freistin at lata lidna filmin inn er 23. novembur 2020, og hann skal sendast umvegis www.wetransfer..com til: filmskapping@nam.fo

11. desembur 2020 verða allir filmarnir, sum dómsnevndin hevur úrvalt, vístir í Havnar Bio kl 19.00. Vinnarin verður kunngjørdur sama kvøld. Vinnandi filmurin verður eisini vístur í Kringvarpinum og á temasíðuni um heimsmálini, sum er á www.snar.fo.
Filmarnir skulu í minsta lagi vera filmaðir í Full HD.



Export format:
Mxf OP1a
Preset: Xdcam HD PAL 50i
Codec: XDCAMHD 50 PAL (4:2:2)

